

# Steintór heiðraður

**Oddafiskurin í Summar Festivalinum hevur øll árini verið Steintór Rasmussen, tónleikari, skald og ígongdsetari , og endabrakið á festivalinum í ár var heiðran av hesum manni, sum fyri stuttum fylti 50 ár**

Dagfinn Olsen

Teir eru nakrir, men ein hin fremsti fyriskiparin av Summar Festivalinum er Steintór Rasmussen. Hann hevur gjørt seg galdandi á føroyska tónleikapalinum síðstu 25 árini sum limur í bólkinum Frændur, hevur sett gongd á og verið við í mongum øðrum verkætlanum og so er hann ímyndin av Summar Festivalinum.

Og tá Dynamitt endaði ársins festival við einum braki, komu mong kend tónleikanøvn á pallin – umframt Steintór –at heiðra hesum undangongumanni, sum fyri stuttum fylti 50 ár.

*dagfinn@sosialurin.fo*

# Dialogos og Gudloysi – ja, og Sølvará

**Tað var lagt upp til eina undirhaldandi framførslu, tá ein av landsins fremstu vísusangarum skuldi á pall.**

Óli Jákup Jacobsen

Hans Hjalti Skaale sang og undirhelt í ein hálvan tíma á Føroya Tele pallinum. At tað var tíðliga um dagin merktist á tí ikki so stóru áhoyrarafjøldini. Men tað merktist ikki á Hans Hjalta, sum væl upplagdur framførdi sínar kendu og stuttligu vísur.

Prikini hjá Hans Hjalta fullu í allar ættir. Men mest fullu tey á tað andaliga økið. "Fyrr var tað so lætt at bólka tað andaliga lívið. Tá var man babs, kuffi ella gets. Tað var ikki so nógv at tosa um. Men í dag er tað nógv roksutari, har vit hava Dialogos og Gudloysi. Ja, so hava vit eisini Sølvará, sum vit øll kenna," segði Hans Hjalti, áðrenn ein sangin hjá sær, meðan øll mannamúgvan flenti.

Í stuttum var talan um eina fríska og stuttliga framførslu, har Hans Hjalti á besta hátt megnaði at halda samband við áhoyrararnar.



# TÚÚÚ...ERT... EIN.....siiigoynari, sigoynari......

**Tann spruttkókandi grýtan á Vágsbøi kókaði fullkomiliga yvir, tá Páll Finnur Páll trivu í síni allar størstu hitt, so sum Mín russiski vinur og forelskaður sjónleikari**

Óli Jákup Jacobsen

Teir eru komnir fyri at vera, og fólkið elskar teir. Páll Finnur Páll fingu allan Vágsbø at hoppa og dansa til sínar sera kendu sangir.

Vágsbøur var næstan fullur, og veðrið vísti seg frá síni bestu náttarsíðu, tá populeru havnamenninir skuldu seta punktum fyri dagsins festivaldag fríggjakvøldið. Og tað gjørdu teir við manér. At urið vístið hálvgum trý, tá byrjað varð, hevði eftir øllum at døma púrt einki at siga. Hvørki fyri Páll Finnur Páll og enn minni fyri áhoyrarafjøldina.

Teir skuldu spæla í trý korter, men tað varð skjótt funnið útav, at tann tíðin ikki fór at halda. Í staðin spældu teir í hálvan annan tíma.

Í mun til í fjør spældu Páll Finnur Páll á stóra palli, har teir í fjør spældu í tjaldinum. Ein vansi við at spæla á stóra palli er, at nærleikin við áhoyrarnir minkar nakað samanborið við tjaldið. Hóast hetta megnaðu Finnur og Páll Oddur alla tíðina at koma út til áhoyrararnar og halda sambandið við teir.

Tað sást og hoyrdist, at Páll Finnur Páll elskaðu at spæla. Og áhoyrararnir elskaðu at hoyra teir.



# Ikki at Kim`sa at

**Kim Hansen hevði frálíka famførslu á Summarfestivalium fríggjgakvøldið.**

dagfinn@sosialurin.fo

Kim Hansen framførdi á Føroya Telepallinum. Kim, sum fyri mongum árum síðani hevur sungið seg inn í føroysk hjørtu, oysti av teim mongu hittunum, sum hann hevur lagt rødd til og ikki minst frálíkt klaverspæl.

**Kim ljóðaði, sum vóru fleiri á palli**

Lítli pallurin gav rúm fyri sambandi við fólkið, og umframt slagarar sum Knút, Fagri Flokkur og Mara, so var talan um ynskikonesrt. Hvat vilja tit hoyra?, spurdi royndi tónleikarin, fólkaognin, úr Nólsoy, og tey fingu verulga ein meistaramann at hoyra.

# Væl eydnað tiltak

**Skal takast samanum ársins Summar Festival, so má sigast, at tiltakið eydnaðist framúr.**

Dagfinn Olsen

Met varð sett í talinum av vitjandi, veðrið var á góðari leið og veðrið gjørdist bara betri, sum fráleið, og so var tónleikaskráin góð.

Alt gekk sum eftir ánni, og eiga fyrireikararnir rós fyri at megnað at hava eit tiltak koyrandi í fleiri dagar, uttan at tað merkist strongd ella ruðuleiki. Væl fyriskipað og greitt. Frá regnið fyrsta kvøldið, til turt og mjørka og so til bakandi sól. So leiðis leið 7. Summar Festivalurin, og tá tey seinastu mundu leggjast sunnumorgunin, skein morgunsólin.

Sjálvt festivaltiltakið má sigast at hava nátt hæddirnar í ár. Talið av vitjandi er tað hægsta higartil, fyriskipanin var fyrimyndarlig og fólk tykjast væl nøgd við vikuskiftið, ið fyri mong setti eitt gott punktum fyri summarið og summarfrítíðina.

*dagfinn@sosialurin.fo*

# Fult hús á Summar Festivalinum

**10.000 fólk hava um vikuskiftið verið á Summar Festivalinum í Klaksvík, og størsta konsertin á festivalinum nakrantíð var leygarkvøldið, tá ið Westlife spældi**

Tann sjeyndi Summar Festivalurin gjørdist tann størsti. Summar Festivalurin hevði fult hús við 10.000 gestum, og tá ið Westlife leygarkvøldið spældi sína konsert, var talan um størstu mannfjøld á Vágsbøi nakrantíð.

Eitt sterkt brand saman við stórum nøvnum lokkaðu hesaferð enn fleiri fólk á Summar Festival. Gestirnir hugnaðu sær ófort á festivalinum hesaferð, og fólk skikkaðu sær sera væl.

Fyrireikararnir av Summar Festivalinum vilja gjarna takka øllum, sum hava verið við til at gjørt ársins festival til tann størsta og besta nakrantíð.

– Og øll verða sjálvsagt boðin aftur á festival næsta ár. Summar Festivalurin 2011 verður hildin í døgnum frá 4. til 6. august. Takk fyri hesaferð – og vit síggjast næsta ár, siga fyrireikararnir.

